# Hvalbingar stevna beint uppeftir




*Hvalbingar hava havt eitt gott fótbóltsár í ár. Í triðju deild hevur liðið verið mest sum einaráðandi, og um vikuskiftið eydnaðist eisini fimtu deild at vinna sína kapping*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Bæði í triðju og fimtu deild eydnaðist Royn at flyta upp hetta kappingarárið**

UPPFLYTING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fótbóltshýrurin í Hvalba er í topp í hesum døgum. Fyri góðari viku síðani tryggjaði besta liðið í bygdini sær uppflyting, tá tað stóð greitt, at einki av mótstøðuliðunum hevði møguleikan at taka tey aftur.

Royn tapti tá annars sín fyrsta dyst á árinum, tá GÍ vann 2-1 í Hvalba. Hetta bilti tó millum lítið og einki, tí EB/Streymur, sum undan hesum var næstfremst, tapti við fýra málum móti einum ímóti HB.

Við hesum stóð greitt, at Royn komandi árið skal spæla í aðru deild, og um vikuskiftið fekk fótbóltshýrurin í bygdini enn eitt spark uppeftir. Í fimtu deild hevði Royn nevnliga vunnið seg fram til finaluna, og tá hendan so skuldi spælast ímóti grannunum av Tvøroyri, so kundi spenningurin neyvan verið størri enn tað sama.

Finalan varð leikt á Krossinum í Sumba, og her stóð skjótt greitt, at tað vóru hvalbingarnir, sum vóru teir stinnaru. Fimta deild er ofta mannað við leikarum, sum hava havt eina fortíð í ovaru deildunum, og hjá Royn var tað Vilmund Michelsen, sum var stóra hetjan hendan dagin. Hann hevur annars eisini skotið mál fyri TB í sínari tíð, men nú er tað so aftur Royn, sum hevur gleðina av máltevinum, sum hann sýndi tvær ferðir hendan dagin. Hartil skeyt Jákup Midjord eisini eitt mál, soleiðis at talan samanlagt gjørdist um greiðan 3-0 sigur til Royn, eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 2-0 til Royn.

ÍF-AB 3-1 (3-1):

# ÍF brúkti hálvan tíma

**Á heimavølli tryggjaðu fuglfirðingar sær uppflyting til 1. deild, og tað var ongan tíð ivi um, hvør skuldi vinna dystin, tá AB var á vitjan**




*Eftir dystin var frøin á leikarum og viðhaldsfólkum sjálvsagt ovurstór. ÍF hevur nú aftur lið í bestu føroysku mansdeildini í fótbólti*

2. DEILD

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var eingin slingur í valsinum. Áskoðarafjøldin var størri í Fuglafirði leygardagin, enn hon plagar at vera, og Sigfríður Clementsen og hansara menn sviku ikki. Áskoðararnir tevjaðu 1. deild, og hálvan tíma eftir fyrsta bríksl var tað greitt, at ÍF næsta kappingarár verður aftur í fremstu røð, eftir at fremsta fóbóltsfelagið í Eysturoy í seksti og sjeyti árunum hesi seinastu árini hevur staðið heilt í skugganum av fimm ella seks øðrum feløgum í oynni.

AB hevði lítið at siga fyrsta hálva tíman, tá ið ÍF skoraði trý mál, sum øll vóru rættuliga góð. Høgni Zachariasen, sum hevur ment seg heilt nógv í hesum kappingarárinum, legði upp til tað fyrsta og skoraði sjálvur tað næsta. Í fyrra førinum legði hann innfyri úr vinstru til liðformannin, Eyðolv R. Petersen, sum úr eitt sindur spískum fluktaði framvið Egini Høgnesen í AB málinum, og í seinna førinum sneiddi miðvallarin framvið trimum ella fýra mótstøðumonnum, áðrenn hann úr ellivu metrum setti framvið málverjanum og umvegis stólpan skoraði til 2–0.

ÍF stóð hesa løtuna á øllum, og Eyðolvur R. Petersen setti punktum fyri málskjótingini hjá heimaliðnum. Eyðun Rygshamar spældi hann leysan í høgru, skjóti síðuspælarin megnaði at halda verjuspælaran aftanfyri seg, og tá ið málverjin kom út ímóti lyfti hann upp um hann og í málið.

Eftir steðgin tóktist tað sum um fuglfirðingarnir á og kring vøllin mest hugsaðu um at bíða eftir síðsta brírkslinum. Jan B. Jørgensen, sum í síni tíð var í NSÍ álopinum, og sum í fjør hjálpti fuglfirðingum, pyntaði um úrslitið fyri AB, ið hevur ásannað, at teir í hvussu so er eitt ár afturat mugu vera í næstbestu deildini. Málið fekk Jan, eftir at Fróði Poulsen í ÍF málinum í fyrstu atløgu hevði hálvbjargað skotroynd.

ÍF hevur vunnið næstbestu deildina, men teir ætla sær at taka tær báðu uppgávurnar, sum standa fyri framman, í tí álvara, sum teir halda, at teir sjálvir, viðhaldsfólkini og ikki minst hini liðini í 2. deild mugu rokna við, at teir gera. Leygardagin skulu teir til Leirvíkar, har LÍF stríðist fyri lívinum, og so fara teir á heimavølli at runda av ímóti Sumba, sum framvegis hevur møguleika at røkka næstfremsta plássinum og harvið endaspælinum um eitt pláss í bestu deildini.

AB eigur VB á heimavølli og KÍ á útivølli. Takið hjá argjamonnum er at halda hesum báðum feløgunum aftanfyri seg á samlaðu støðutalvuni.

**Dysturin í tølum**

ÍF–AB 3–1 (3–0)
1–0: Eyðolvur R. Petersen
2–0: Høgni Zachariasen
3–0: Eyðolvur R.Petersen
3–1: Jan B. Jørgensen



FS Vágar-KÍ 3-1 (1-0):

# Vágamenn dugdu at gera mál

*KÍ hevði bóltin nógv, og teir skaptu nógvar møguleikar, men vágamenn vóru munin hvassari framman fyri málinum*




**Hóast KÍ í løtum sýndi stórspæl, so kláraðu teir ikki at gera sær dælt av leikligu yvirvágini. Vágamenn vóru stinnari at fáa mál burtur úr sínum opnu møguleikum, og at enda gjørdu teir eisini eitt mál fyri klaksvíkingar**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var fyri tað mesta gott fótbóltsspæl á skránni, tá ið FS Vágar og KÍ spældu í nógva vindinum í Miðvági sunnudagin.

Hóast umstøðurnar ikki vóru av teimum bestu, vóru klaksvíkingar rættiliga í hopla fyrsta hálva tíman av dystinum. Spælið gekk væl kring allan vøllin, teir vunnu nærdystirnar ímóti teimum sperdu vágamonnunum, og teir broderaðu seg ferð eftir ferð í gjøgnum vágaverjuna.

Men eitt manglaði. Og tað er tað, sum hevur mesta at siga í einum fótbóltsdysti. Málini.

Hóast KÍ hevði eina øргrynnu av royndum og fleiri opnar kjansir, so fingu teir ikki bóltin í vágakassan, hvussu teir so enn royndu.

Fyrsta hálva tíman var tað líka við, at bólturin fleyg um oyruni á málverja og verjuspælarum, men inn fór bólturin ikki. Fleiri ferðir vóru hornaspørkini og innleggini nask, men avgerandi fóturin var ikki til staðar hendan dagin, hóast KÍ hevur toppskjúttin í landskappingini á sínum liði.

### FS Vágar vaknaði

Seinasta korterið av fyrra hálvleiki vildu vágamenn sleppa upp í part, og hóast teirra spæla langt frá var so flótandi sum hjá gestunum, so vóru teir vandamiklir. Teir fangaðu fleiri ferðir KÍ-verjuna langt frammi á vølllinum, og Birgir Joensen, sum dugdi væl at temja og venda sær, skapti vandastøður.

Clayton Soares og Birgir Joensen høvdu góðar møguleikar at leggja FS Vágar á odda, men Karstin Joensen í KÍ-málinum stóð sera væl.

Hann var tó prísgivin í eina førinum. Birgir Joensen longdi bólt við høvdinum til Jens Erik, sum dróg nakað fram í vinstru síðu, hann legði flatt innfyri til Clayton Soares, sum stýrdi bóltin í málið við fremru stong.

Aftaná stóra KÍ-trýstið fyrsta partin av dystinum, vóru tað nú vágamenn, sum vóru á odda, og sum høvdu havt kjansir til fleiri mál.

### Vandi á ferð

Í seinna hálvleiki var KÍ aftur leikliga omaná, og kjansirnir vóru eisini fleiri í tali. Hjalgrím Elttør var spældur blankur, men vágamaður fekk sparkað burtur, tá hann sendi fram við málmanninum.

Fleiri aðrar vandastøður vóru frammanfyri málið hjá FS Vágum, men enn einaferð mangladu gestirnir at fáa avgerandi skotið á bóltin.

Seinastu 10 minuttirnar tveittu klaksvíkingar alt fram fyri at javna, men tað skapti eisini møguleikar til vágamenn.

Og tað var FS Vágar, sum enn einaferð skoraði. Birgir Joensen varð spældur leysur í vinstru, hann dróg móti málinum og sendi fram við KÍ-málverjanum til 2-0. Tá vóru bara einir fimm minuttir eftir at spæla.

Løtu seinni var aftur galið í KÍ-verjuni, eftir at liðið misti bóltin á veg fram á vøllin. Málverji og verja fingu ikki bóltin burtur, og so endaði drúgva støðan í brotsteiginum við, at Clayton Soares sendi í máli úr stuttari fjarstøðu.

### Skoraðu fyri KÍ

Nú var 3-0 til FS Vágar, og tað gav skeiva mynd av dystinum, har gestirnir eisini høvdu stórar kjansir, og allatíðina høvdu leikliga yvirvág.

Í yvirtíðini hjá dómaranum fekk KÍ eitt mál, men tað máttu vágamenn gera fyri teir. Ein høgur bóltur var sendur innfyri, og tað endaði við, at Ári Thomassen sendi í egið mál við høvdinum.

Lítla løtu seinni hevði Aleksander Djordjevic, sum var sendur fram seinastu løtuna, gyltan møguleika at minka meira um munin, men úr fimm metrum stútaði hann á málverjan.

Tað endaði tí við, at vágamenn fingu sín fyrsta heimasigur í ár, og teir vóru teir sera fegnir um. Teir eru framvegis næstniðast, men hava møguleikan at fáa VB aftur í seinastu tveimum umførunum.

Klaksvíkingar kundu havt spælt seg í eina góða støðu undan dystinum ímóti NSÍ sunnudagin, men við heilkiksaranum í Vágum hava teir helst spilt sín seinasta møguleika fyri at fáa nakað líkinda úrslit burturúr hesum kappingarárinum.

**FSV-KÍ 3-1 (1-0)**

1-0: Clayton Soares
2-0: Birgir Joensen
3-0: Clayton Soares
3-1: sjálvmál

**FS Vágar:** Jákup Joensen – Jógvan Hendrik Samuelsen, Jack Johansen, Albert Ari Thomassen , Silva – Sjúrður Ellefsen, Rói Árting, Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen – Birgir Joensen, Clayton Soares
**KÍ:** Karstin Joensen – Leon Bjartalíð, Jan Andreassen, Aleksandar Djordjevic, Harley Bertholdsen – Arnold Joensen, Allan Joensen, Atli Danielsen, Eyðun Klakstein (Fríðin Ziskason, 62.) – Hjalgrím Elttør, Jacob Bymar
**Dómari:** Eiler Rasmussen

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!